## Wardum-brøður til Kyndils-kvinnur

Komandi kappingarár verða tað brøðurnir Uni og Hannis Wardum, ið verða venjarar hjá fremsta kvinnuliðnum hjá Kyndli. Uni og Hannis hava báðir drúgvar royndir sum venjarar, bæði í fremstu deildunum, har teir millum annað hava staðið á odda fyri fremsta mansliðnum hjá H71, umframt at teir í nógv ár eisini hava verið ungdómsvenjarar. Báðir hava teir eisini í nógv ár sjálvir verið leikarar á besta mansliðnum hjá Kyndli. Afturat sær hava venjararnir Hans Mikkelsen, fysiskan venjara, og kvinnurnar eru longu farnar í gongd við fysisku venjingina.



## Hyypia heldur fram í Liverpool

Eitt sera gott kappingarár hjá danska Daniel Agger hevur kostað Sami Hyypia plássið í miðverjuni hjá Liverpool. Vanliga verjan var Hyypia og Carragher, men nú hevur 22 ára gamli danin tikið yvir. Hyypia verður stórt sæð bara nýttur, tá ið ein av hinum tørva ein steðg, og hetta hevur fingið søgurnar at ganga um at Hyypia var á veg úr felagnum. Hesum søgum vísur venjarin hjá liðnum, Rafael Benitez, nú aftur. Hann sigur seg hava tosað við ljóshærda verjuleikaran um málið, og báðir eru samdir um, at hann skal halda fram komandi kappingarár. 33 ára gamli Sami Hyypia hevur leikt í Liverpool síðan 1999, tá ið hann kom til felagið frá hollendska Willem II.

# Noyðist at skuffa nakrar

**Hóast dysturin neyvan verður lættur, so heldur landsliðsvenjarin, at hansara uppgáva í nógvar mátar er lættari hesaferð, enn hon so ofta hevur verið**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Hóast uppgávan á pappírinum er meira ræðandi, enn hon nakran tíð hevur verið, so tykist hon kortini lættari enn vant hjá venjaranum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Eins og spælararnir, so stendur Jógvan Martin Olsen leygardagin fyri síni størstu uppgávu nakrantíð. Hóskvøldið spurdu vit landsliðsvenjaran, hvussu hann á nakran hátt kann fyrireika seg og liðið til setningin, har heimsmeistararnir standa fyri framman.

- Tað er ein góður spurningur. Men eg haldi nú ikki, at tað ávirkar meg so øgiliga nógv øðrvísi, enn allir aðrir dystir. Onkursvegna er tað so, at spælararnir eru nógv meira konsentreraðir, og tú merkir týðiliga, at allir vilja sleppa inn á vøllin til handan dystin.

Ger tað kanska tína uppgávu lættari?

- Á ein hátt verður hon nógv lættari. Men samstundis ger tað tað nógv truplari, at einir tríggir spælarar skulu sáldast frá. Tí tað er eingin, sum fellur ígjøgnum undir venjingunum.

So tyngsta uppgávan verður kanska at siga nøkrum, at teir ikki skulu byrja inni?

- Ja, tí teir hava allir lagt nógv fyri og gjørt tað gott undir venjingunum.

### Skulu tora

Sjálvandi hava føroysku spælararnir staðið fyri stórum uppgávum fyrr, og tí heldur Jógvan Martin, at hetta er enn eitt fet í so máta. Eins og spælararnir tá hava roynt seg móti øllum teimum bestu, sum eru í heiminum.

- Tað skuldi líka verið, um vit fingu Ongland í næsta lutakastinum.

- Men vanliga stúri eg ikki heilt so nógv fyri teimum heilt stóru fótbóltslondunum, sum eg geri fyri sonevndu millumtjóðunum. Ofta síggja vit, at liðið lyftur seg eyka nógv og faktiskt yvirpræsterar í slíkum dystum. Og tað vóni eg í øllum førum eisini verður støðan hesaferð.

Og tað verður kanska eisini neyðugt?

- Tað verður tað. Men samstundis sum vit helst skulu arbeiða enn harðari, enn vit vanliga gera, so verður tað serstakliga týdningarmikið, at vit eisini halda upp á bóltin. Tað trúgvi eg er lykilin til, at vit ikki koma undir óneyðuga nógv trýst. Vit skulu tora at spæla fótbólt. Eisini tá vit spæla móti Italia, eru boðini frá landsliðsvenjaranum.

# Størsti dysturin nakrantíð

**Hóast tummilsreglan sigur, at ein og hvør dystur er ein nýggj uppgáva, so er eingin loyna, at upplivingin leygardagin er serstøk hjá fótbóltslandsliðnum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sjálvt veteranurin og stýrimaðurin á føroyska liðnum, Óli Johannesen, staðfestir, at tað er meira enn »bara« ein vanligur landsdystur, nú talan er um heimsmeistararnar. Eisini hóast fyrireikingarnar í størst møguligan mun eru tær somu, sum tær vanliga eru.

- Vit kunnu sjálvandi royna at fáa ta hvíld, sum vit skulu. Kanska meira vætu og betri føði, so vit fáa tey fáu prosentini eyka. Og so skulu vit sjálvandi eisini vera topp-motiveraðir, nú tað eru sjálvir heimsmeistararnir, sum vit skulu stríðast við.

Nú hevur tú verið við í fyrireikingunum til 80 landsdystir ella so. Er tað munur á teimum undanfarnu 80 og so hesum eina dystinum móti liðnum, sum er best í heiminum?

- Tað merkir man týðiligt. Tað verður tosað nógv meira um mótstøðuna. Hvørjir teir eru, og nær teir koma. Og venjingarnar sjálvar eru nógv meira intensar. So hetta er heilt víst ein serstakur dystur fyri okkum allar í hópinum.



*Spenningurin er sera stórur í landsliðsleguni, nú heimadysturin móti heimsmeistarunum er á skránni. Eisini hjá veteraninum og liðformanninum, Óla Johannesen*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hesa fer

**Tað tykist upplagt, hvørjir ellivu skulu á vøllin, og hvørjir teir tríggir eru, sum eru tætt at teimum fyrstu ellivu, men sum landsliðsvenjarin í kvøld fer at siga, at teir skulu sita á beinkinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Fyri fyrstu ferð nakrantíð skulu Føroyar klokkan 19.45 leygarkvøldið stríðast ímóti fótbóltsliði, sum er heimsmeistari.

Tað hava verið veldugar avbjóðingar, tá ið Føroyar í undankappingardystum hava staðið andlit til andlit við nakrar av heilt stóru europeisku fótbóltstjóðunum. Her verður hugsað um Spania, Týskland og Frakland.

Spania hevur ongantíð verið heilt uppi á altjóða landsliðstindinum, men talan var um stórar stjørnur úr eitt nú Real Madrid og Barcelona. Týskland, sum Føroyar vóru um reppið at fáa stig ímóti bæði á útivølli og heimavølli, var varðaheimsmeistari, eins og Frakland var tað, tá Føroyar seinast spældu móti teimum.

Nú er avbjóðingin uppaftur størri. Italia er heimsmeistari, og trettan av spælarunum, sum síðsta summar eftir brotssparkskapping vunnu HM finaluna ímóti Fraklandi, vóru í italska ferðalagnum, sum í gjárkvøldið lendi í Vágum.

Tað kemur ógvuliga sjáldan fyri, at Føroyar leygardag ikki spæla landsdyst fyrrenn klokkan 19.45. Sport Five eigur sjónvarpsrættindini. Teir hava selt rættindini at sjónvarpa til Italia. Sum í øðrum londum við Miðalhavið eru tey í Italia von við at fara til fótbólt, tá ið dagurin er vorðin meiri svalur. Tí verður fyrsta bríkslið á Tórsvølli ikki fyrrenn eftir náttúrða.

Millum allar teir føroysku spælararnar, sum hava fingið landsliðsboð, livir vónin um at sleppa upp í part. Summir spælarar eru fullvísir í at verða millum teir fyrstu ellivu. Aðrir vita, at teir hava møguleika fyri at standa inni á vøllinum, tá ið tjóðsangirnir verða spældir, og so eru tað teir, sum heilt víst vita, at teir fara at manna beinkin. Hesir vóna, at teir sleppa upp í part eina løtu. Felags fyri allar hesar er, at teir vita, at tað er góður møguleiki fyri, at teir ikki sleppa upp í part.

Jógvan Martin Olsen hevur undir fyrireikingunum sagt, at tað er so mikið av kapping um plássini, at tað eru fjúrtan spælarar, sum kunnu manna tey fyrstu ellivu plássini. Tað er tí, at landsliðsvenjarin sigur seg vita, at tað verður vónbrot hjá trimum at fáa at vita, at tað ikki er pláss fyri teimum.

### Verjan

Eingin ivi er um, at Jákup Mikkelsen fer at verja málið. Tað er heldur eingin ivi um, at Óli Johannesen og Jón Rói Jacobsen fara at manna miðverjuna. Óli eigur landsliðsmetið og fast pláss í miðverjuni, inntil hann sjálvur gevst ella spælir seg rudduliga av. Jón Rói Jacobsen er rættuliga komin fyri seg eftir drúgvan skaðasteðg. Hann venur við superliga liðnum hjá AaB, sum hann fleiri ferðir hevur spælt við seinastu vikurnar, og tí er hann sjálvskrivaður á landsliðnum.

Mortan úr Hørg og Atli Danielsen hava verið nevndir sum evni til høgra bakk. Tað verður serliga verjukendar dygdir og taktisk tilvitan og ikki framrættað vongverjuspæl, sum tað verður brúk fyri ímóti Italia. Atli Danielsen hevur í vár verið fastur maður á Frem miðvøllinum. Spurningurin er ikki, um Atli skal spæla, men hvussu hann skal verða partur av kabalini. Tað er ikki so sannlíkt, at hann